## Djurholm í B36-nevndina

Eftir at hava verið í tungum fíggjarligum sjógvi seinastu tvey-trý árini, kundi nevndin hjá B36 í dag leggja fram ein roknskap, sum sýndi eitt avlop, ið táttar í 400 tkr. Hetta í mun til eitt hall, sum í 2008 var omanfyri hálvaaðru millión krónur. Kristjan á Neystabø, sum er formaður, Kjartan Mohr og Edvard Heen halda fram í nevndini, sum eisini varð víðkað til fimm limir. Nývaldu limirnir eru Bjarni Djurholm, ið helst er betur kendur sum politikari, og Sámal Ímundarson.



## Dýr mistøk

Lukasz Fabianski hevði ein alt annað enn góðan dag í málinum hjá Arsenal, tá hann var beinleiðis íblandaður báðum málunum hjá Porto í 1/8-finaluni í gjárkvøldið. Arsenal tapti dystin 2-1, eftir at Fabianski í tveimum førum hevði framt stórt mistak. Fyrru ferðina var eftir 11 minuttum, tá hann kloddaði eitt innlegg frá Varela í egið net. Sol Campbell, byrjaði millum teir fyrstu 11 hjá Arsenal, og hann takkaði fyri álitið, tá hann eftir 18 minuttum stútaði Arsenal upp á javnt. Ein støða, sum helt sær, til góðir fimm minuttir vóru spældir av seinna hálvleiki. Tá gjørdi Fabianski av, at hann mátti taka eina afturlegging frá Campbell upp, og so gjørdu Porto og Falcao skjótt av.

# Canal+ kann missa Premier League

**Barclay Premier League hevur selt sjónvarpsrættindini fyri tey trý komandu kappingarárinum til Medge Consulting**




Jákup Mørk

Seinastu mongu árini hevur tað annars verið Canal Digital, sum hevur átt rættindini til Premier League, sum hevur ment seg til at vera kanska dýrasta deildin yvirhøvur at keypa rættindi til.

- Vit eru fegin og errin um, at Medge Consulting hevur keypt tað, sum helst eru mest týðandi fótbóltsrættindini í heiminum í dag. Norðurlond hava tætt tilknýti til enskan fótbólt, og vit ætla at halda fast um tann áhuga, sum hetta hevur skapt, sigur Peter Liljestrand, sum er annar av eigarunum av Medge Consulting.

Í tíðindaskrivi frá the Barclay Premier League sigur Richard Scudamore, at tey eru fegin um nýggja samstarvsfelagan, og at tey ikki ivast í, at hetta fer at geva Premier League ein enn betri miðlapall í Norðurlondum.

Rættindini fevna um allar beinleiðis dystir, sum eru 380 um árið, endursendan av dystum, hæddarpunkt og rættindini til tíðindi á fartelefon og alnetinum.

Medge Consulting hevur ikki sjálvt nakra sjónvarpsstøð, men er ætlanin at selja rættindini til norðurlendskar støðir. Í Noreg hevur TV2 keypt rættindini at senda, og í løtuni eru samráðingar við fleiri støðir um rættindini at senda í Danmark. Finnlandi og Svøríki.

Á Canal+ siga tey, at tey í løtuni als ikki kunnu gera viðmerkingar til, um ella hvørjar avleiðingar hetta fær fyri rásina.



Tom Henning Øvrebø upplivdi veruliga sjikanu, tá hann í fjør hevði dømt seinnu hálvfinaluna millum Chelsea og Barcelona. Nú er líkt til, at viðhaldsfólk hjá Fiorentina kasta hatur á norska dómaran

# Øvrebø aftur í fokus

**Dómarin, sum í fjør varð ákærdur fyri at døma Chelsea úr Champions League, er alt enn væl umtóktur í Firenze í dag.**




Jákup Mørk

Umframt eitt alt annað enn væl dømt reytt kort, var talan nevnliga um sera kontroversielt mál, sum avgjørdi dystin, tá Fiorentina á útivølli tapti 2-1 móti Bayern Munchen í gjárkvøldið.

Heimaliðið legði seg á odda beint undan steðginum, tá Arjen Robben sendi brotsspark í netið. Eitt brotsspark, sum spælararnir hjá Bayern vóru heldur misnøgdur um, tí hetta steðgaði einum álopi, sum var ávegis at geva mál.

Fiorentina javnaði stutt eftir steðgin við máli frá danska Per Krøldrup, og hóast heimaliðið trýsti, so tóktist Fiorentina hava fatur á javnleikinum.

Klokkan var um teir 90 minuttirnar, tá Robben aftur royndi seg við gjøgnumbroti. Skotroyndin varð í fyrstu atløgu blokerað, men bólturin stakk út til ein púrasta leysan Klose, sum væl og virðiliga rangstaddur kundi senda bóltin í netið. Og so var frøi á heimaliðnum, meðan øðin var samsvarandi stór hjá Fiorentina.

Ikki minst tí teir eisini kendu seg snýttar, tá Øvrebø eftir 71 minuttum gav Massimo Gobbi reytt kort. Talan var greitt um sjónleik frá Arjen Robben, tá hesin lat seg detta. Men sjónleikurin var altso nóg væl framførdur til at bera reytt kort við sær.

Øvrebø upplivdi í fjør, at óðir Chelsea-fjepparar sendu SMS-boð til hansara, og nú er so spurningurin, um italsk SMS-boð í næstum koma á fartelefon hansara.

# Fyrsta gullið til Noreg

**Marit Bjørgen vann OL-gullheiðursmerki nummar 99 í tí søguliga yvirlitinum hjá Noregi**




Heri Simonsen

Okkara grannar fyri eystan hava verið ótolnir, men nú brast endiliga fyri nøv. Marit Bjørgen vann gull í klassiskum skíðrenningarsprinti.

Fyri Marit Bjørgen er hetta ein stórur persónligur sigur, aftaná ikki at hava livað upp til teir stóru forvæntningarnar hjá heimafólkinum á teimum seinastu vetrarleikunum, sum vóru í italska býnum, Torino í 2006.

Marit Bjørgen rakk heldur ikki sínum máli til heimsmeistaraskapini í Sapporo í 2007 og í Liberec í 2009. Og tí var hon sjálvsagt ovurfegin um at hava nátt málinum.

- Tað er hetta heiðursmerki, sum eg havi manglað. Nú kann eg rætta ryggin, og njóta tað sum er eftir av vetrarleikunum, sigur Marit Bjørgen við norska kringvarpið.

Fríggjadagin er 15 kilometurs teinurin fyri, og tá er Marit Bjørgen millum favorittarnar. Aftaná at hava vunnið gull í tí klassiska sprintinum og 10 kilometurs frístíli, eru vónirnar stórar til Marit Bjørgen.

- Tað eru nógvir møguleikar fyri framman. Eg havi ein jaligan hugburð, um tað sum fer at henda, sigur tann higartil einasti OL-gullvinnarin á hesum vetrarleikunum, Marit Bjørgen.

Gullheiðursmerki hjá Marit Bjørgen var gullheiðursmerki nummar 99 hjá Noregi, síðani teir fyrstu OL-vetrarleikirnar í 1924. Nú bíða grannar okkara í eystri við stórum spenningi eftir hvør fer at vinna OL-gullheiðursmerki nummar 100 fyri Noreg á vetrarleikunum.

Enn er Noreg tó aftanfyri Svøríki á hesum leikunum. Svøríki hevur vunnið tvær gull. Noreg hevur eina gull, tvær silvur og tvær bronsu. Finnland hevur eina silvur.



Marit Bjørgen vann í gjár OL-gull nummar 99 fyri Noreg